# Pedagogbladið

FØROYA PEDAGOG FELAG



## Fyrireika ráðstevnu um trivnað hjá børnum

Blað Nr. 2 - 2004

# Oddagrein



Nýggja nevndin í Føroya Pedagogfelag hevur nú verið til verka í slakar tríggjar mánaðir. Sum nýggjur formaður í felagnum er sjálvandi nógv, sum eg skal kunna meg um. Tað er natúrligt, og tykir mær sera spennandi.

Tað er av týdningi, at felagið kemur meira út til limaskarðan, og sum eina roynd at bøta um tað, hava vit verið úti og vitjað stovnarnar í Suðuroy. Hetta var ein sera góður og lærurikur túrur fyri felagið – og fingu vit eisini gjørt okkum eina mynd av hvussu støðan er. Ætlanin er í nærmastu framtíð at fara og vitja hinar stovnarnar kring Føroya land. Vit her í felagnum hava eisini varhugan av, at teir fysisku karmarnir, í nógvum av dagstovnum og búðstovnum okkara, ikki eru nøktandi. Arbeiðsviðurskiftini eru onkunstaðni undir alt lágmark – og her áttu avvarandi myndugleikar at fari inn og kanna viðurskiftini, soleiðis at arbeiðsumstøðurnar vóru munandi betri enn tær eru í dag.

Felagið arbeiðir eisini við at skipa fyri fleiri limafundum kring landið. Vit arbeiða við at álitisfólkini kunnu skipa seg úti í økinum, og samstundis fáa størri gagn av hvørjum øðrum. Ætlanin er, at skipa fyri næsta áltisfólkafundinum miðskeiðis í juni, og tá fara vit meira málrættað til verka at skipa álitisfólkini betur. Álitisfólkini eru eitt gott amboð hjá felagnum, og við góðum álitisfólkum, fáa vit eisini eitt gott og stekt felag.

Nevndin í Føroya Pedagogfelag hevur eisini sett sær fyri, at gera sítt til, at vit fáa fleiri útbúnar pedagogar. Vit halda, at raðfestingin at útbúgva pedagogar, er sera lág. Í skrivandi løtu vita vit als ikki um hvussu støðan verður eftir summarfrítíðina – tí fíggjarlógin er júst samtykt, og vit vita ikki hvussu høga ella lága raðfesting, pedagogútbúgvingin fær í tí nýggju fíggjarlógini. Vit hava avtalað ein fund við Mentamálaráðið – og har fara vit at leggja okkara sjónarmið fram hesum viðvíkjandi.

Ein onnur træta, sum hevur verið nógv at hoyrt í síðstuni, er trætan millum Tórshavnar Kommunu og fakfeløgini viðvíkjandi jarðarferð og heilsuøðrindum í arbeiðstíð. Enn er ongin loysn fingin á hesum málinum, men vit standa fast við, at talan er um sáttmálabrot, og at hesin sáttmálin ikki kann sigast upp fyrr enn sáttmálaskeiðið er úti. Tað er av stórum týdningi at vit verja okkara rætt, og ikki lata ávísar kommunur gera júst tað teimum lystir, og smíða sínar egnu lógir.

*"At enda vil eg ynska tykkum øllum limum og samskiftisfólki okkara eina góða summarfrítíð"*


**Ábyrgdarblaðstjóri:**

Jarvin Feilberg Hansen,
Tlf. 31 75 76
t-post:
jarvin@pedagogfelag.fo

**Fyrisiting:**

Jarvin Feilberg Hansen,
formaður
Katrin H. Thomsen,
fyrisitingarleiðari

**Nevnd:**

Jarvin Feilberg Hansen,
formaður.
Ann-Elisabeth Joensen,
næstform.
Bjørghild í Geil,
kassameistari.
Laila Petersen, skrivari
Gitta av Kák,
nevndarlimur.

**Útgevari:**

Føroya Pedagogfelag
Postboks 318
110 Tórshavn
Tlf. 31 75 76
Fax 31 75 73
e-mail:
pedagog@pedagogfelag.fo

**Uppseting og prent:**

Dimmalætting

**Lagt til rættis:**

Sp/f Rit&Ráð

**Seinasta freist**

at senda blaðnum
tilfar til næsta blað:
25. august 2004

Blaðið verður prentað í 1800 eintøkum, kemur út fýra ferðir um árið, og verður sent limunum í Føroya Pedagogfelag ókeypis.
Onnur áhugaði kunnu gerast haldarar fyri 100 kr. árliga, við at seta seg í samband við felagið.
Loyvt er at endurgeva tilfar úr blaðnum (myndir undantiknar) treytað av at keldan verður upplýst.



*Frá vinstru: Ann-Elisabeth, Laila, Jarvin, Bjørghild og Gitta*

# Nevndin skipa seg

Eftir aðalfundin hevur nevndin skipað seg. Aðalfundurin valdi Jarvin Feilberg Hansen til formann, og hevur nevndin annars skipað seg soleiðis, at Ann-Elisabeth Joensen, pedagogur, er næstformaður, Bjørghild í Geil, hjálparfólk, er kassameistari, Laila Petersen, pedagogur, er skrivari og Gitta av Kák er nevndarlimur.

# Summarfrí og onnur boð

Upplýsingar um nær felagsskrivstovan er stongd vegna summarfrítíð og onnur viðuskifti fáast á heimasíðu felagssins



www.pedagogfelag.fo

# Felagslívstrygging

Vit vilja minna limirnar á, at um tit fara í farloyvi uttan løn, kemur einki inngjald fyri felagslívstryggingina, ið er kr. 125.- mán.

Tit detta automatiskt burtur úr tryggingini um tit ikki gjalda inn sjálvi, og eru tá ikki tryggjaði. Tit fáa konto nr. við at venda tykkum til felagið.

# Úr innihaldinum


| | |
|---|---|
| Oddagrein | [síða 2] |
| Úr innihaldinum | [síða 3] |
| Nevndin skipa seg | [síða 3] |
| Spurningar um frítíð | [síða 4] |
| Nýggj mannagongd í álitisfólkaarbeiðinum | [síða 5] |
| Hetta er met stór undirtøka | [síða 6] |
| Tað segði hann tá... hvat sigur hann nú | [síða 8] |
| Nógvar orsøkir til at vitja stovnar | [síða 10] |
| Dagstovnaøkið er nær tengt at vinnulívinum | [síða 11] |
| Alneyðugt at vit dagføra okkara fakliga kunnleika | [síða 12] |
| Ævintýrferðin | [síða 13] |
| Eitt gott og stuttligt tiltak | [síða 14] |
| Hvussu bøta vit um stuðulsfólkaskipanina? | [síða 15] |
| Ráðstevna um hvussu børnini trívast | [síða 16] |
| Úr heimi hugans | [síða 18] |
| Føroysk útbúgving á altjóða støði | [síða 20] |
| Havnin – ein býur har børnini trívast | [síða 22] |

# Spurningar **um frítíð**



Nú nærkast summar-frítíðin. Í flestu førum eru eingir trupulleikar í sambandi við at frítíðin skal haldast, men nakrir ivaspurningar vísa seg at vera afturvendandi. Felagið hevur í stuttum hesar viðmerkingar:

**Hvør tekur avgerð um, nær frítíðin skal haldast:**

Sambært frítíðarlógini er tað arbeiðsgevarin, sum í samráð við løntakaran ásetur nær frítíðin skal haldast.

Tó verður ásett í lógini, at minst 24 dagar av frítíðini skulu gevast samanhangandi í tíðarskeiðnum millum 2. mai og 30. september.

**Rættur arbeiðsgevarans...**

at taka endaliga støðu til nær summarfrítíðin skal takast merkir eisini, at um arbeiðsplássið steingir ávísa tíð, hevur løntakarin skyldu til at taka summarfrítíðina hetta tíðarskeið alt undir tí fyritreyt, at 24 daga reglan, sum nevnd frammanfyri, verður hildin.



**Rættur til summarfrí:**

Frítíðarárið verður roknað frá 1.apr. -1. apríl.

Sjálvt um limur ikki hevur uppvunnið sær rætt til frítíð við fullari løn, hevur limur tó altíð rætt til 5 vikur summarfrí – hin spurningurin er so hvusssu nógva løn ein hevur rætt til í summarfrítíðini. – Uppvunnið verður 2,5 dagar frítíð við løn fyri hvønn mánaða ein hevur arbeitt. – tvs. er limur komin í starv 1. jan. 04 – hevur viðkomandi rætt til løn í 7,5 dagar t.e. 2,5 dg fyri jan + febr.+ mars, tá frítíðarárið skiftir 1.apríl.

Sambært frítíðarlógini er frítíðin 30 dagar – tvs. 6 dagar x 5 vikur – Frítíðin verður roknað mánadag til og við leygardag.

**Hvat hendir um løntakari gerst sjúkur, áðrenn hann skal byrja summarfrítíð sína:**

Um løntakari gerst sjúkur og boðar arbeiðsgevaranum frá hesum, áðrenn summarfrítíðin skal haldast, so verður summarfrítíðin útsett so leingi viðkomandi er sjúkrameldaður.

Um talan er um arbeiðspláss sum steingir í summarfrítíðini og løntakari gerst sjúkur t.d. 2 dagar áðrenn summarfrítíðin skal byrja og t.d. er sjúkrameldaður í 10 dagar, so byrjar summarfrítíðin hjá viðkomandi ikki fyrr enn viðkomandi er frískur aftur.

Í slíkum føri eigur viðkomandi sostatt 8 dagar eyka summarfrí, sum arbeiðsgevarin leggur í samráð við viðkomandi løntakara.

**Hvat hendir um løntakari gerst sjúkur í summarfrítíðini:**

Um løntakari gerst sjúkur í summarfrítíðini hevur ein ikki rætt til eyka summarfrítíð.

Undir serligum umstøðum, kann løntakari søkja um at fáa frítíðina góðgjørda frá arbeiðsgevaranum.

**Hvussu er rættarstøðan, tá løntakari verður sagdur úr starvi:**

Í lógini er ásett, at um løntakari er uppsagdur, so má frítíðin ikki leggjast inn í uppsagnartíðina.

Hetta merkir, at viðkomandi løntakari í slíkum føri, bæði hevur rætt til summarfrítíð og uppsagnarfreist smb. galdandi lóggávu.

**Serstakir frídagar samb. ásetingar í sáttmálunum:**

Um serstakir frídagar, s.s. ólavsøkuaftan og ólavsøkudagur liggja í summarfrítíðini,eigur løntakari hesar dagar afturat frítíðini.

Tó er hetta ikki galdandi um ein serstakur frídagur fellur á ein sunnudag.

Í ár fellur Ólavsøkan á mikudag og hósdag, ið merkir, at hetta gevur $1^1/_2$ frídag eyka.

**Eyka frívikan.**

Galdandi frá 1. jan. 2004 hava limir rætt til eina serstaka fríviku – Henda frívika hevur serligar reglur og er ikki tengd at Frítíðarlógini.

Reglurnar finna tit á heimasíðuni undir "Sáttmálar" / avtala um serstaka fríviku.

Sjálv avtalan stóð í Pedagogblaðnum/ des.03 undir teiginum "Samráðingar 2003".



# Nýggj mannagongd í álitisfólkaarbeiðinum

Álitisfólk á dagstovnaøkinum

## Álitisfólk fara framyvir, í størri mun, at samstarva í hvør sínum øki í landinum

Nevndin í Pedagogfelagnum arbeiðir í løtuni við, saman við álitisfólkunum, at broyta mannagongdina í álitisfólkaarbeiðinum. Nýggja mannagongdin ber m.a. í sær, at álitisfólkini í hvørjum øki sær í landinum, fara at hava størri samskifti hvørt við annað, at tey í størri mun sjálvi taka stig til fundir og tiltøk, og at tey ivaleyst eisini fara at hittast oftari. Formaður felagsins sigur, at tað er serliga innan dagstovnaøkið, at neyðugt er við eini umskipan, nú so nógvir dagstovnar verður bygdir kring alt landið og harvið økist talið á álitisfólkum munandi. Álitisfólkini innan dagstovnaøkið verða kanska eini hundrað í tali um ikki so langa tíð. Hann heldur, at tað kann vera bæði trupult, kostnaðarmikið og tíðarkrevjandi fyri álitisfólk í útjaðaranum, at savnast á einum stað, sum vanliga hevur verið í Havn.

Tað var m.a. í sambandi við hesar ætlanir, at øll álitisfólk felagsins herfyri vóru boðað til fundar í Havn, og tyktist ætlanin at fella í góða jørð hjá øllum. Ført varð m.a. fram, at tað kann eisini hava sínar fyrimunir, at fólk hittast í smærri bólkum at viðgera teir ymisku spurningarnar, sum álitisfólk skulu taka støðu til.

Álitisfólkafundurin hesaferð varð skipaður í tveimum. Fyrst álitisfólkini á dagstovnunum og síðani tey á bústovnum. Umframt at tosa um nýggju skipanina, varð eisini kunnað um ymisk onnur viðurskifti. Fleiri av álitisfólkunum eru nývald, og tí varð eisini kunnað um skyldur og rættindi hjá álitisfólkum. Eisini varð avtalan millum felagið og arbeiðsgevaran um álitisfólkaskipanina viðgjørd. Í ávísum førum heldur felagið ikki, at avtalan er nóg greið, og tað verður so tikið upp í næstu samráðingum. Gegnisspurningurin, sambært fyrisitingarlógina, varð eisini umrøddur. Hetta er ein trupul spurningur, ikki minst í einum so miklið lítlum samfelag sum okkara, men hóast tað, er spurningurin ikki minni týdningarmikil. Kenna álitisfólk á sær, at gegni bilar í ávísum førum, eiga tey at lata varaálitisfólkið taka sær av tí ávísa málinum.

Álitisfólkaskipanin er ein sera avgerandi og týdningarmikil partur í felagsarbeiðinum, og tí er umráðandi, at álitisfólkini hava neyðugan førleika og áhuga fyri arbeiðinum, soleiðis at tey trívast og støðast í hesum starvi. Felagið vónar og roknar við, at m.a. nýggja skipanin og viðkomandi skeið fara at gera sítt til at gera tað enn meira áhugavert at vera álitisfólk.

Álitisfólk á serstovnaøkinum



Aðalfundurin

# Hetta er met stór undirtøka







Aðalfundurin var eins og seinasta ár hildin á Hotel Føroyum – uml. 450 limir vóru møttir á fundinum.

Hetta er met. Á seinasta aðalfundi vóru uml. 350 limir á aðalfundinum. Í ár var val av nýggjum formanni á skránni, tá Carita Björklund, ið hevur verið formaður seinastu seks árini, ikki stillaði uppaftur.

**Formansval:**

Tveir limir stillaðu upp sum formansevni: Ann-Elisabeth Joensen, næstformaður í felagnum og Jarvin Feilberg Hansen, pedagogur, ið er leiðari á sambýlinum á Bóndaheygi.

Fyrst framløgdu tey, ið hava innstillað bæði formansevnini, fram. Bæði formansevnini framløgdu síðan sínar ætlanir fyri felagið framyvir um tey vórðu vald til nýggjan formann í felagnum.

Jarvin Feilberg Hansen fekk flestar atkvøður, og varð sostatt valdur til nýggjan formann í felagnum.

**Nevndarval:**

Marita Ejdesgaard og Gitta av Kák, nevndarlimir stóðu fyri valið. Báðar tóku við afturvali. Umframt tær báðar, stillaði Laila Petersen, pedagogur, eisini upp til nevndina.

Laila Petersen varð vald í nevndina við flest atkvøðum, meðan atkvøðurnar stóðu á jøvnum millum Maritu Ejdesgaard og Gittu av Kák. Við lutakasti varð Gitta av Kák afturvald.

**Í nevndini eru sostatt:**

Jarvin Feilberg Hansen, form.
Ann-Elisabeth Joensen, leiðari
Bjørghild í Geil, hjálparfólk
Gitta av Kák, leiðari
Laila Petersen, pedagogur

**Tiltakslimir eru:**

Maud Wang Hansen, leiðari
Jenny á Sýnuni, hjálparfólk
Marita Ejdesgaard, hjálparfólk

**Internir grannskoðarar:**

Bjørgvin og Katrin Holm.

# 450 fólk á aðalfundi

**Uppskot til lógarbroytingar.**

Uppskot varð innkomið um at broyta lógirnar hjá felagnum í samband við val av formanni og nevndarlimum, soleiðis, at valið framyvir skal fara fram við brævatkvøðugreiðslu.

At atkvøðuseðlar verða sendir út til allar limir, soleiðis at allir limir eru við í valinum. Hetta fyri at tryggja øllum limum sama rætt at velja nevnd. Framført varð m.a., at teir limir, sum arbeiða innan bústovnaøkið og tí eisini ofta eru til arbeiðis leygardagar, hava ikki møguleika at møta á aðalfundi.

Drúgt orðaskifti varð um hetta uppskot, m.a. niðanfyri standandi fyrimunir og vansar um uppskotið varð samtykt.

At hetta ikki eggjar limunum at møta á aðalfundi, tá atkvøðast tá kann heimaifrá.

At hetta fer at viðføra uppstillingarfundir, soleiðis at tey uppstillaðu kunnu koma til orðanna yvir fyri limunum.

At hetta er ein víðgongd broyting, ið krevur meira umhugsni.

At hetta uppskotið kann sodna og takast uppaftur á næsta aðalfundi.

Fyrsta uppskotið um val av nevnd varð sett undir atkvøðugreiðslu.

Lógarbroytingar krevja minst 2/3 av atkvøðunum á aðalfundinum.

Uppskotið fekk 218 atkvøður og varð tí ikki samtykt.

Aftaná drúgt orðaskifti tóku uppskotsstillararnar aftur næsta uppskotið um val broytingar til av formanni.

Aðalfundurin gjørdist drúgvur, so limirnir vóru svangir, tá teir loksins komu til náttúrðaborðið.

*Katrin, skr.*









# Tað segði hann TÁ... og hvat sigur hann NÚ?



Í síni røðu á aðalfundi felagsins, nam Jarvin við nakrar spurningar, sum hann segði seg vilja taka upp, varð hann valdur. Og tað varð hann. Hesum skal hann nú standa til svars fyri.

Jarvin segði m.a.:"Ein av teimum mest umráðandi uppgávunum hjá Pedagogfelagnum er at fáa lýst tað pedagogiska arbeiðið nógv betri enn tað higartil hevur verið gjørt. Hetta er eisini fyri at kunna klárleggja okkara arbeiði betri fyri kommunum og landi. Pedagogfelagið eigur at standa á odda í hesum átaki at sjónliggera og góðskumeta okkara virksemi. Soleiðis gerast vit nógv meira tilvitandi og dugnalig í okkara faki."

– Tað er eingin loyna, at vit mangan uppliva, at pedagogfakið manna millum er lítið virt, og tí vilja vit vísa á, hvussu týdningarmikið okkara arbeiði er. Tað er sera umráðandi, at vit fáa lýst væl og virðiliga, ikki minst mótvegis okkara myndugleikum, hvat arbeiði okkara í veruleikanum er. Okkara arbeiði er ikki bert at ansa børnum. Tað liggur so mangt annað í tí eisini. Ikki minst er okkara uppgáva at menna tey børn, sum vit varða av. Vit hoyra ofta, at tað, at ansa børnum, er hvørs manns føri, og júst tað sigur okkum, at fakið er ikki serliga nógv virt. Hetta sæst eisini aftur í lønini, tí ikki er ov nógv sagt, at pedagogar eru ein láglønarstættur, sigur Jarvin og minnir á, at í dag seta m.o. foreldur munandi størri krøv til innihaldið í ansingini enn fyrr. Og soleiðis eigur tað sjálvandi eisini at vera. Foreldur eru eisini í dag við í planleggingini av arbeiðinum, og tað er ein stór uppgáva at hava við so mong ymisk børn og somuleiðis so mong og ymisk foreldur at gera. Við øðrum orðum: Innihaldið í okkara arbeiði skal meira í fokus.

### Serstovnaøkið í dvala

"Tað er alneyðugt, at felagið og serstovnaøkið finna saman aftur eftir nøkur ár í dvala. Ein samstarvsnevnd hevur verið á pappírinum, og fyri at sjálvt felagið skal hava nakran møguleika at fylgja við hvat gongur fyri seg á serstovnaøkinum, mugu hesir partar finna saman aftur", segði Jarvin á aðalfundinum.

-Orsøkin til, at eg nevndi serstovnaøkið er, at okkara limir, sum arbeiða innan hetta øki, mangan hava kent á sær, at felagið hevur gjørt ov lítið fyri teir. Tí fara vit at seta okkum í samband við hesi starvsfólkini fyri at kanna eftir, hvat tey í veruleikanum vilja, og hvat vit kunnu gera við tað. Ongantíð betur, um limirnir sjálvir gera vart við seg og síni sjónarmið. Eitt hugskot er, at vit seta eitt samstarvsráð við fólki úr serstovnaøkinum og felagnum, at arbeiða við teimum spurningum, sum har leika á.

### Brúk fyri nógv fleiri pedagogum

"Innan dagstovnaøkið hendir ótrúliga nógv. Nógvir dagstovnar verða bygdir, og tað kann gerast ein trupulleiki at fáa starvsfólk at manna hesar stovnar. …Her kundi verið hóskiligt at hugsa um skúlan. Sum støðan er í løtuni, verður bert ein pedagogflokkur tikin inn um árið. Her má felagið fara aktivt inn og vísa á tann pedagogiska tørvin, sum er í landi okkara."

– Tað er eingin ivi um, at vit tørva munandi størri fakliga arbeiðsmegi. Vit hava eina lóg innan dagstovnaøkið sum sigur, at hvør stovnur skal vera mannaður við í minsta lagi 2/3 av pedagogum. Í fjør tørvaðu vit 150 pedagogisk ársverk bert á dagstovna-

økinum fyri at lúka hesar treytir. Og lítið er at ivast í, at tørvurin, um heilt stutt tíð, verður munandi størri, vísir formaðurin á, og sigur seg ikki at duga at skilja, hví Mentamálaráðið ikki skipar so fyri, at í minsta lagi tveir pedagogflokkar árliga verða tikir inn á skúlan. Vit hoyra um trupulleikan at fáa nóg mikið av næmingum á Sjómansskúlan og Tekniska Skúlan, og tí átti at verið heilt natúrligt at tikið fleiri næmingar á júst tann skúlan, har áhugin og tørvurin er størstur. Jarvin hevur annars avtalað fund við Mentamálaráðið og landsstýrismannin í mentamálum, har hann fer at leggja síni sjónarmið fram.

### Útbúgva hjálparfólk

"Tað finnast nógv góð hjálparfólk á stovnunum. Hesi hava helst ynskt sær eina størri teoretiska vitan innan pedagogiska fakið. Teimum átti at staðið í boði at fingi eina grundútbúgving í t.d. eitt ár, sum kundi givið teimum størri førleika og ábyrgd á stovninum."

– Hetta skal sjálvandi ikki skiljast soleiðis, at eg mæli til at loysa tørvstrupulleikan við at hjálparfólkini fáa eina ávísa upplæring, og so eru tey pedagogar. Heldur skal tað skiljast so, at í fyrsta lagi hava hjálparfólkini bara gott av at fáa nakað av fakligari vitan, og harafturat kundi tað ført við sær og hjálpt til, at hjálparfólk fáa áhuga fyri at útbúgva seg sum pedagogar, – ein ávís fyrireiking at fara á skúla, sigur Jarvin, sum eisini hevur sett hetta mál á skránna til fundin við Mentamálaráðið.

### Vitanarmiðdepul

"Nevndin í Pedagogfelagnum átti at lagt lunnar undir ein sokallaðan Vitanarmiðdepli. Í hesum Vitanarmiðdepli skulu ymiskir fakbólkar vera. T.d. lærarar, sosialráðgevarar, heilsuástøðingar, sjúkrarøktarfrøðingar, ergoterapeutar, fysioterapeutar og læknar."

– Sokallaði Vitanarmiðdeplar er ikki ókent fyribrigdi aðrastaðni, eitt nú í grannalondum okkara. Hetta kundi verið eitt forum,- skulu vit siga eitt kompetent tjakforum,- sum tók ymiskar spurningar upp. Tað kann vera í sambandi við tørvin hjá einum einstøkum barni ella meira yvirskipaðar spurningar. Sjálvandi kunnu vit altíð læra av øðrum fakbólkum, og hetta hevði so verið eitt høvi, sigur Jarvin, sum ikki sær ein nýggjan stovn fyri sær, men heldur ein skipaðan bólk, har serfrøðingar av ymiskum slag stinga høvdini saman við meira ella minni jøvnum millumbilum. Hann hevur enn ikki tosað við avvarandi fakfeløg um spurningin, men tað fer hann í næstum at gera.




# Nógvar orsøkir til at vitja stovnar

– At gera felagið meira sjónligt millum limirnar, at tosa við starvsfólkini og kunna meg um arbeiðsviðurskiftini hjá okkara limum, eru nakrar av orsøkunum til, at eg havi sett mær fyri at vitja hvønn einasta stovn í landinum, sigur pedagogfelagsformaðurin, sum byrjaði sína rundferð í Suðuroy



Dagstovnurin í Vági

"Grundarsteinurin undir felagnum eru sjálvsagt limirnir. Tað eru teir, sum mynda felagið. Tað skal setast nógv meira fokus á at koma meira út til limaskaran, soleiðis at limirnir fáa eina kenslu av, at felagið er til, og at tað virkar fyri sínar limir".

Hesi vóru m.a. orðini í røðuni hjá Jarvin Feilberg Hansen á aðalfundi, áðrenn hann varð valdur til formann, og hetta lyfti ætlar hann sær eisini at halda. Hann er longu byrjaður, og fyrst gekk leiðin til Suðuroyar.

Vitjað varð á dagstovninum Mýrifípuni, Frítíðarskúlanum og Útibarnagarðinum í Trongisvági, og í Vági varð vitjað á dagstovninum, Frítíðarskúlanum, Verkstaðnum á Bakka og Sambýlinum á Bárafløtti

– Uttan at fara í smálutir í sambandi við hvønn einstaka stovnin vit vitjaði kann eg siga, at tað stendur væl til í Surðuroy hvat normering viðvíkur, og tað kunnu vit bert fegnast um. Hinvegin haldi eg ikki, at hølis- og harvið umstøðurnar, bæði hjá børnum og starvsfólki, í øllum førum vóru rættiliga nøktandi. Sera trongligur tóktist onkur stovnur at vera, í mun til tal av børnum, og umstøðurnar uttan um onkran stovn, kundu heldur ikki sigast at vera nøktandi, sigur Jarvin sum heldur, at í mongum førum eru starvsfólk av teirri fatan, at hetta er bara so, og kann ikki vera øðrvísi. Sjálvandi skulu tílík viðurskifti vera í lagi, og vildi eg hildið, at tað var ikki annað enn rætt og rímiligt, at landsmyndugleikarnir, so sum landslækni og Arbeiðseftirlitið, fóru at kanna viðurskiftini hjá øllum stovnum í landinum, sigur Jarvin, sum tó skundar sær at leggja afturat, at í ávísum førum er talan um fyribils loysnir, og hann sigur seg ikki ivast í, at kommunurnar, sum nú varða av barnaansingini, fara at gera sítt til at øll tílík viðurskifti verða nøktandi.

– Eg eri sera fegin um at hava vitjað hesar stovnar og starvsfólk, og eg havi eisini varðhugan av, at starvsfólkini hildu, at hetta var eitt gott hugskot. Vit fingu práta saman um mangt og hvat. Fólk høvdu nógv at spyrja um, og vit

*Vitjan á útibarnagarðinum í Trongisvági*





Mýrufípan í Trongisvági



Jarvin tosar við Anniku og Elken á sambýlinum á Bárðafløtti...

...og við Unn og Kristel á dagstovninum í Vági.



fingu eisini innlit í mangt, sum vit ikki áður hava hugsað so nógv um. Bæði eg sjálvur og Katrin, umsitingarligi leiðari felagsins, sum var við á ferðini. Vit gjørdust enntá kunnnug við onkran stovn, sum vit als ikki vistu um var til. Útibarnagarðin í Trongisvági, sum dagstovnurin hevur dagligu umsitingina av, sigur Jarvin, sum heldur tað vera sera ynskiligt, at felagið fær at vita um stovnar, sum koma undan kavi. Saman umtikið, ein sera spennandi og læruríkur túrur, fyri ikki at tala um mikla blíðskapin, vit møttu allastaðni vit vitjaðu.

# Dagstovnaøkið er nær tengt at vinnulívinum

Frá frítíðarskúlanum í Vági



Í Vági er eitt nú dagstovnaøkið sera nær tegnt at vinnulívinum við sínum upp- og niðurgongutíðum, sum í stóran mun hava gjørt seg galdandi ikki minst tey seinastu árini, og hetta ger tað sera torført at leggja ætlanir fyri framtíðina. Tað ger seg galdandi bæði fyri útreiðslur, kommunan skal seta seg fyri, og somuleiðis peningaorku og tørv hjá foreldrum.

Tá vit vitjaðu á Frítíðarskúlanum, sum heldur til í Vágs Skúla, varð sagt okkum, at í løtuni vóru átta børn á Frítíðarskúlanum, men til spurningin hvussu mong vera næsta ár svarar hann: "Kanska verður fullsett, ella kanska kemur eingin… Kemur verulig gongd aftur á vinnulívið í býnum, økist tørvurin beinanvegin, men eru slakari tíðir, minkar tørvurin samsvarandi." Í ein ávísan mun kann hetta sama gera seg galdandi á dagstovninum, sum í løtuni heldur til í húsum, kommunan hevur leigað til endamálið. Annars hevur kommunan ætlanir um at byggja dagstovn beint vestanfyri verandi stovn.

# Alneyðugt at vit dagføra okkara fakliga kunnleika

– At fáa møguleikan at fara á viðkomandi skeið, eigur at vera ein heilt natúrligur partur av arbeiði okkara, halda Elisabeth Hentze og Eyðna Joensen, pedagogar á Sankta Josefs Barnagarði í Havn



Elisabeth Hentze, útbúgvin pedagogur í Danmark í 1998, hevur síðani tá arbeitt í Sankta Josefs Barnagarði, og Eyðna Joensen, útbúgvin í Føroyum í 1999, starvaðist fyrst á sambýli áðrenn hon byrjaði á Sankta Josefs Barnagarði.

Á hvørjum ári fáa tveir av pedagogunum á Sankta Josefs Barnagarði møguleika til at fara uttanlands á skeið ella ráðstevnu. Í ár fingu Elisabeth Hentze og Eyðna Joensen hendan møguleikan. Tær eru júst heimaaftur komnar av skeiði í Århus, sum pedagogiski eftirútbúgvingarstovnurin, saman við Dansk Pædagogisk Forum, skipaði fyri, og tær lata sera væl at.

– Tað eru ikki so nógv ár síðani, at vit bert høvdu eitt fátal av dagstovnum, at kalla bert í Havn, men hesi seinastu árini hava vit fingið ein heilan hóp av stovnum víða hvar í landinum. Royndir, serfrøði og gransking innan økið eru tí rættiliga avmarkaðar her hjá okkum, og tí er umráðandi og áhugavert, at fáa møguleika at nema sær vitan av tí, onnur, sum hava áralangar royndir, hava gjørt sær. Og tað var henda ráðstevna eitt gott dømi um. Á ráðstevnuni vóru fleiri serfrøðingar, sum hvør, út frá sínum sjónarhorni, greiddu frá sínum sjónarmiðum, men allir við høvuðsboðskapinum um, hvussu vit eiga at taka støði í styrkjuna hjá børnunum, heldur enn støði í tí, sum tey eru minni góð til, siga tær báður, Elisabeth og Eyðna.

Hetta er sætta árið á rað, at pedagogar á Sankta Josefs Barnagarði luttaka á tílíkum ráðstevnum, sum bæði starvsfólk og leiðsla leggja sera stóran dent á, og vilja halda fram við. Og tað eru ikki bert tey, sum fara á ráðstevnuna, sum fáa nakað burturúr. Heimaafturkomnar greiða tær sínum starvsfeløgunum frá, og væl og virðiliga verða tey ymisku evnini viðgjørd.

Aðrastaðni, eitt nú í Danmark, verður sera nógv gjørt við gransking av børnum, og í hesum granskingarhøpi eru nógvir ymiskir serfrøðingar so sum læknar, pedagogar, sálarfrøðingar o.a., og tí er tað gull vert hjá okkum at uppliva eina tílíka konsentratión av vitan og royndum á økinum, eru Elisabeth og Eyðna samdar um. Tær halda, at møguleikin hjá starvsfólki at luttaka í tílíkum tiltøkum eigur at vera ein heilt natúrligur partur av teirra arbeiði, soleiðis at møguleiki er fyri at fáa dagført sína vitan.

### At uppliva og skilja ímillum

Elisabeth og Eyðna nýttu eisini høvi til, meðan tær vóru í Danmark, at vitja onkran dagstovn. Ein rættiliga øðrvísi stovn, sum var skipaður sum útibarnagarður, har størsti denturin varð lagdur á teir náttúrugivnu møguleikarnar og ikki minst djórahald. Sera áhugavert at uppliva og síggja, hvat ber til, og tað hevur eisini givið teimum íblástur at royna eitthvørt í sínum dagliga virksemi. Men tær leggja dent á, at eins týdningarmikið tað er at uppliva hvat og hvussu onnur gera, er tað at duga at skilja í millum hvat er møguligt og gagnligt her hjá okkum.

*Spennandi tilboð til allar dagstovnar og frítíðarskúlar!*

# Ævintýraferðin 2004

## ...inn í tónleika- og sjónleikaheimin

Í summar verður eitt einastandandi høvi hjá dagstovnum at bjóða børnum á ævintýraferð. Børnini fáa møguleika at síggja og at luttaka í sjónleiki og tónleiki við gandi og øðrum spennandi og mennandi undirhaldi. Tiltakið hevur longu staðið sína roynd í Svøríki, har tað fekk sera góða móttøku.

Dánjal á Neystabø, Búi Dam og Beinta Clothier greiða her frá einum tilboði, tey hava at bjóða dagstovnum og frítíðarskúlum:

Vit eru trý, Dánjal á Neystabø, Búi Dam og Beinta Clothier, sum bjóða okkum fram at skipa fyri stutligum og mennandi ævintýra- og tónleikaferðum fyri børn í dagstovnum í Føroyum. Vit hava øll royndir innan tónleik og sjónleik á høgum stigi. Millum annað er ein okkara lesandi á Malmö Academi of Music, har stórur dentur verður lagdur á musikkpedagogikk, og á týdningin, tónleikur hevur fyri menningina av børnum. Vit hava verið á rundferð á dagstovnum í syðra Svøríki við tónleika- og sjónleikaframførslum, og tiltakið var sera væl móttikið, bæði av børnum og pedagogum. Øll hildu, at tað var mennandi fyri børnini, serliga í hesum døgum, tá teir ymsku miðlarnir á mangan hátt skapa hugaheimin hjá børnunum - uttan størri ávirkan frá teimum sjálvum. Vit hava sett okkum fyri, at eisini føroysk børn skulu sleppa á eina ævintýraferð.

### Íblástur skapar gleði

Tiltakið er í høvudsheitum ein sjónleikur við nógvum tónleiki. Vit hava ein kláran reyðan tráð og eitt greitt innihald. Tó er leikurin gjørdur broytiligur og fleksibul við tí fyri eygað, at draga børnini inn í leikin so nógv sum gjørligt, uttan at reyði tráðurin verður kvettur.

Íblástur skapar gleði. Bæði fyri okkum sum framføra við hjálp av í tí íblástri, vit fáa frá børnunum, og fyri børnini, sum merkja, at støði eisini verður tikið í teirra hugaheimi, við tað, at tey sjálvi eru við til at skapa.

Kunsturin liggur ikki so nógv í tí, sum tú gert, men hvussu tú fært børnini at gera tað sjálvi. Hetta er grundarlagið, sum arbeitt verður út frá. Tíð og stað eru ikki av so stórum týdningi, tí vit arbeiða við evnunum hjá børnunum at ímynda sær ein veruleika. Vit kunnu tí koma á tykkara stovn, bæði innan- og uttandura, eins væl tíðliga og seint á degi. Tá ið vit eru farin, hava børnini saman við okkum skapt eitt nýtt spæl, sum tey kunnu halda fram at spæla og menna. Tað vístu royndirnar í Svøríki í hvussu so er.

Tónleikurin, sum er ein týðandi partur av leikinum, verður spældur inn á eina fløgu. Fløguna fáa teir stovnar, sum bíleggja sær eina ævintýraferð, til tess at ferðin kann halda fram, tá ið vit eru farin.

### Bílegging av einari ævintýraferð

Børn og stovnur hava ikki fyri neyðini at fyrireika seg til tiltakið. Tað einasta sum krevst er áhugin fyri at menna leiklistarligu og musikalsku gávurnar hjá børnunum, og so sjálvandi hugurin at hava eina stuttliga og eina øðrvísi løtu saman.

Til ber at bíleggja frá 15. juni til á Ólavsøku. Vit kunnu koma á stovnin við stuttum skotbrá, hava ljóðføri, búnar og annað við, og tiltakið tekur umleið 1-2 tímar. Prísurin er 3000 kr.

Bíleggingar og fyrispurningar kunnu sendast til neystabo@hotmail.com.

Til ber eisini at ringja til Dánjal á Neystabø á telefon +45 32 58 57 92, +45 26 67 78 98 ella 21 77 21.

Vit seta okkum í samband við stovn tygara beinan vegin, sum vit hava fingið eina bílegging ella ein fyrispurning.



**Búi Dam**
Er Guitaristur úr Havn. Búi hevur millum annað spælt saman við Eivør Pálsdóttir, Lossingarmonnum, 200 og øðrum tónleikabólkum. Hann hevur lisið tónleik í Danmark, og á Cuba, og hevur harumframt arbeitt bæði á barnagarði og frítíðarskúla.

Búi er uppvaksin í sjónleikaraumhvørvi, og veit av royndum hvussu stóran týdning tónleikur og sjónleikur hevur tá børn mennast.



**Dánjal á Neystabø**
Hevur verið á rundferð á dagstovnum í Svøríki við tónleika- og sjónleikaframførslum, har tiltakið var sera væl móttikið av bæði børnum og pedagogum.

Dánjal hevur seinastu 10 árini arbeitt nógv við tónleiki og sjónleiki, millum annað í Skeyk, Grease, Leikhúsjólum og í Nýggjárskabarettini. Hann hevur spælt í Tangz og øðrum tónleikabólkum í sløk 10 ár og skrivað tónleik. Arbeiddi tvey ár í Santa Frans skúla, m.a. sum tónleikalærari, og lesur í løtuni á Malmø Academi og Music.



**Beinta Clothier**
Beinta dugir bæði at syngja, dansa og at spæla sjónleik. Seinstu mongu árini hevur hon arbeitt nógv við sjónleiki, haft leiklutir millum annað í Pippi, Pinoccio, leikhúsjólum og útisjónleikum. Hevur harumframt arbeitt við barnaútvarpi, við barna- og ungdómssendingum í sjónvarpinum og í barnagarði. Í løtuni er Beinta í Danmark í útbúgving sum sjónleikari.

Verkætlan hjá Hvølpastovu á Stella Maris Vøggustovu:

# Eitt gott og stuttligt tiltak

## – sum er við til at styrkja sambandi millum stovn og foreldur

*Orð og myndir:* Jenny Thomassen

Endiliga kom so tann dagur, vit hava fyrireikað okkum til í langa tíð. Dagurin, tá børnini fingu høvi til at bjóða foreldrum, systkjum, ommum og abbum við í Hvølpastovuna, og síggja og eisini keypa mangt og hvat, sum børnini sjálvi høvdu tilevnað á vøggustovuni. Fyrireikararnir, Jenny Thomassen, Marjun Petersen, Birtha Vestergaard og Beinta Flóinsdóttir, greiða sjálvar frá fyrireikingunum og tá stóri dagurin upprann. Niðurstøðan av tiltakinum er: Eitt sera gott og stuttligt tiltak, sum er við til at fáa eitt gott og positivt samstarv við foreldrini.

Í mars mánað í 2003 byrjaðu vit at tosa um, at tað hevði verið stuttligt at havt ein dag í vøggustovuni, har børnini kundu bjóða foreldrum, systkjum, ommum og abbum við. Tosað varð so aftur og fram um hetta, og varð úrslitið, at vit skuldu skipa fyri einum degi, har vit skuldu selja ymiskt, sum børnini hava gjørt. Børnini mála og tekna ofta – so hví ikki royna at vísa hesar vøkru lutirnar, sum børnini sjálvi gera, fram.

### Á hotell fyri pengarnar

Eftur at vit so endiliga høvdu tikið stig til hvat vit vildu við hesum hugskotinum, byrjaðu vit at gera ymiskt til endamálið. Avgjørt varð, at pengarnir, sum komu inn, skuldu brúkast til at fara á hotell at eta saman við børnunum. Vit høvdu tá avgjørt, at dagurin skuldi verða í juni, men funnu skjótt útav, at tað ikki bar so væl til. Fleiri av børnunum fingu pláss í barnagarðinum, og nýggj børn skuldu byrja. So tað forðaði okkum í at náa endamálinum. Vit ætlaðu so at hava dagin um mánaðarskiftið november/desember, men tá endurtók sami trupulleiki seg.

Men hugskotið datt ikki burtur – tvørturímóti. Eftir jól byrjaðu vit so aftur, og stutt eftir avgjørdu vit so hvønn dag tað skuldi verða, líka mikið hvat so skuldi koma í vegin. Dagurin varð nú ásettur at vera leygardagin 27. mars frá kl. 11.00 til 13.00, og so varð einaferð enn farið av álvara til verka.

Málað bleiv á pappír, á ymiskar lutir úr glasi, og okkurt barnið tøvdi eisini onkra mynd. Børnini bakaðu smákøkur at koyra í onkra málaða krukku. Ymiskt varð gjørt burtur úr málningunum, so sum kort, dekkserviettar og



innrammaðar myndir. Gløsini vóðu pyntaði við urtapottum, páskaliljum, ljósum o.ø.

### Strævið men spennandi

Í vikuni, sum dagurin skuldi verða, rokaðust børnini og tey vaksnu óført við at fáa alt gjørt liðugt. Strævið var tað, men tað strævna munaði einki upp í móti hvussu spent vit øll vóru at koma í vøggustovu dagin eftur.

Tá klokkan bleiv 11.00 byrjaðu børn, syskin, foreldur, ommur og abbar at koma, og tá høvdu starvsfólkini borðreitt við kaffi, saft og smákøkum. Børnini komu so erpin inn í vøggustovuna hendan dagin, tí nú skuldu tey vísa síni ting fram, sum tey sjálvi høvdu evnað til. Tá øll vóru komin, fingu tey so høvi at fáa sær ein drekkamunn, tosa við hvønn annan, meðan børnini spældu saman.

### Sum í grind

Tá tey høvdu sitið eina góða løtu, byrjaði onkur at keypa tað sum barn teirra hevði gjørt. Dúgliga varð talt saman hvussu nógv skuldi gjaldast. Har var mikil rokan, sum í grind, tá rindast skuldi. Øll vildu tey so fegin fáa lutirnar heim við frá sínum barni. Onkur omma helt fyri, at tað var bara at keypa alt og betala. Ein mamma helt, at hon mátti skunda sær at keypa okkurt áðrenn omman slapp framat, tí so fór omman avstað við øllum. So tað var veruliga stuttligt at síggja, hvussu glað øll vóru fyri at vera har, og eisini at síggja børnini, hvussu erpin tey fóru avstað aftur við teimum vøkru lutum, tey høvdu stríðst við í longri tíð.

### Nú skal eftirmetast

Nógv hava vit lært av hesi mánaðarligu drúgvu verkætlanini. Nú eftirmeta vit tiltakið. Hvat gjørdu vit skeivt, og hvussu kann tað gerast betri næstu ferð. Tí ikki mistu vit mótið til eitt tílíkt tiltak aftur seinri – tvørturímóti – hetta vilja vit royna aftur.

Eitt sera gott og stuttligt tiltak, sum er við til at fáa eitt gott og positivt samstarv við foreldrini.



# Hvussu bøta vit um stuðulsfólkaskipanina?

**Faklig menning av stuðulsfólkum og skipað viðurskifti, høvdu havt við sær betri trivnað og øktan effektivitet í allari skipanini.**

Hetta sigur Magna Jógvansdóttir, sum er pedagogur og dagliga arbeiðir sum stuðul á Lítla Skógi hjá 5 ára gamla Emili, sum hevur Down syndrom. Pedagogblaðið hevur skift orð við hana um tað at vera stuðul og um starvsøkið sum heild.

At vera stuðul á dagstovni hjá børnum við menningartarni er bæði áhugavert og spennandi, sigur Magna. Tú kemur sum stuðul inn í ein barnagarð og skal gera eitt miðvíst arbeiði til tess at stimbra og menna barnið. Tað er jú ein stór avbjóðing at hava sum uppgávu at menna eitt barn, sum ikki hevur somu innaru fortreytir sum onnur børn. Hesi børn eru sera ymisk og hava somuleiðis sera ymiskan tørv á stimbran. Her skal serkunnleiki til á so nógvum økjum.

### Fløkjaligur bygnaður

Stuðulsfólkaøkið er landsmál, men bygnaðurin á økinum er fløkjaligur. Serdeildin undir stuðulsfólkaskipanini í Tórshavnar Kommunu umsitur børn undir skúlaaldur við menningartarni fyri Almannastovuna. Eg eri sett í starv í Stuðulsfólkaskipanini, men starvist dagliga á dagstovninum Lítla Skógi. Leiðarin á stovninum hevur ábyrgd av sínum starvsfólki, men hevur ikki ábyrgdina av mær, tí eg eri uttan fyri normeringina á stovninum, og ikki sett í starv av dagstovninum.

Sum stuðul kennir tú teg stundum sera einsamalla. Tað sigur seg sjálvt, at tá tú sum fakfólk arbeiðir á sama stað í fleiri ár, ynskir tú at hava ávirkan á títt arbeiðspláss. Vit, sum arbeiða dagliga við hesum børnum, kenna teirra tørv. Tí haldi eg, at vit áttu at havt ávirkan á, hvussu arbeiðið á stovninum verður lagt til rættis. Sjálv eri eg sera heppin, sigur Magna, tí bæði leiðsla og starvsfólk á mínum stovni hava stóra virðing og forstáilsi fyri tí arbeiði, eg eri sett til. Men sum heild er støðan hjá stuðlunum hesum viðvíkjandi púra tilvildarlig. Tað er einki í skipanini, sum tryggjar, at hesi viðurskifti eru nøktandi.

### Neyðugt við ráðgevandi toymi

Børnini eru sum sagt sera ymisk og hava tí ymiskan tørv á stimbran. Talan kann vera um rørsluliga stimbran, málsliga/samskiftisliga stimbran, sosiala stimbran ella annað. Tað er óneyðugt at siga, at eingin einstaklingur fær verið serfrøðingur á øllum hesum økjum. Tí haldi eg, at nakrar grundleggjandi broytingar eiga at verða gjørdar.

Framhald á síðu 24

# Ráðstevna um hvussu børnini trívast

Hvat er ein góður stovnur?

Hvussu handfara vit fráboðanar- og tagnarskyldu?

Hvussu er við foreldra-førleikanum?



Hesir eru nakrir av spurningunum, sum starvsfólk á dagstovnum, dagrøktarar, barnaverndarlimir, heilsusystrar, sosialráðgevar, kommunu- og landspolitikarar og onnur við áhuga fyri hesum evnum fara at viðgera á eini ráðstevnu, sum dagstovnaleiðarar skipa fyri í september. Hugskotið til ráðstevnuna spratt úr eini stevnu fyri dagstovnaleiðarar fyri hálvumøðrum ári síðani, har tey settu nakrar bólkar at arbeiða við ymiskum málum. Ein teirra var ráðstevnubólkurin, sum Maibritt Simonsen, Poula Eidesgaard, Turið Horn og Jórun Niclasen, manna, og sum nú skipar fyri hesi ráðstevnu við bæði føroyskum og donskum fyrilestrahaldarum.

Annar av donsku fyrilestrahaldarunum er Erik Sigsgaard, sum m.a hevur undirvíst á Danmarks Lærerhøjskole. Hann hevur granskað nógv um børn á stovnum, um samskiftið millum børn og vaksin, og um tey vaksnu, soleiðis sum børn uppliva tey. Hann hevur eisini skrivað fleiri bøkur og

smárit um evnið. Á ráðstevnuni fer hann m.a. at tosa um børn og dagstovnar.

### Trivnaðurin á stovninum

– Hvussu trivnaðurin hjá børnum í veruleikanum er á stovni, hava vit sjálvandi mangan tosað um og gjørt okkara meiningar um. Hvat hendir við barninum, sum er á stovni frá eygað er opið til langt út á seinnapartin? Hvat hendir børnunum, eru umstøðurnar á stovninum ikki í lagi – bæði fysiskar og sálarligar umstøður, og hvørji krøv seta vit okkum sjálvum? Hesir eru spurningar, sum vit mangan hava sett okkum. Okkara hugsanir byggja vit á tað, vit eygleiða, men nakrar veruligar kanningar hava vit als ikki at byggja á í Føroyum. Men tað hava tey eitt nú í Danmark, og tað verður m.a. við støði í hesum kanningum hjá Erik Sigsgaard, at hann fer at tosa, siga fyrireikararnir, sum harmast um, at vit ongar tílíkar kanningar hava gjørt í Føroyum. Høvdu vit tað, hevði tað eisini verið lættari at handfarið mangar av teimum støðum, sum fólk, ið hava við børn at gera, mangan koma í. Umframt at geva eitt boð upp á, hvat ein góður stovnur er, fer Erik Sigsgaard eisini at tosa um bók sína "Skæld ud". Hjálpir at skelda, og hvørji langtíðarárin hevur skeld á børnini, spyr Erik Sigsgaard, og hann roynir at svara sjálvur. Tað verður eisini í sambandi við trivnaðin á stovnunum, at Marjun Nielsen, sálarfrøðingur, fer at røða um, hvussu børn hava tað í Føroyum, hvussu tað sálarliga umhvørvið er á dagstovnum og í heiminum; og fer hon at geva eitt boð upp á, hvat skal til, fyri at børn trívast í Føroyum.

### Foreldur og stovnur

Annar av donsku luttakarunum á ráðstevnuni er Margrethe Brun Hansen, sum er útbúgvin pedagogur og cand. psych. Hon hevur m.a. havt sína dagligu gongd á 45 stovnum í Danmark sum sálarfrøðingur hjá *"Landsforeningen Frie Børnehaver og Fritidshjem".* Margrethe hevur m.a. skrivað bókina *"De kompetente forældre"*, sum sambært høvundinum eins væl kundi borið heitið *"Sig mær, hvussu foreldur tykkara eru, og eg kann siga tykkum hvussu tit eru."* Hon fer at viðgera spurningin um nýggja ættarliðið av foreldrum út frá tí veruleika, at samfelagið hevur broytt seg so nógv, at børn, foreldur og stovnar hava fingið heilt aðrar treytir at virka undir. Hon fer at royna at svara spurninginum: Skilir stovnurin tað nýggja ættarliðið av foreldrum?

Eisini fara Minna Poulsen og Jóngerð Poulsen, heilsufrøðingar, at siga sína hugsan um foreldraførleika. Útgangsstøði teirra er, at góður forelderaførleiki er, tá foreldur eru før fyri at geva barninum kærleika gjøgnum tað, foreldrini siga, gera og eru. Fyrireikararnir av ráðstevnuni siga, at mangan kann tað tykjast, at ov stórur avgerðarrættur verður latin børnunum, sum í veruleikanum hava fyri neyðini at hava ávísar karmar at halda seg til. Børn ynskja, at foreldur taka avgerð fyri tey, alt annað er at leggja eina ov stóra ábyrgd á barnið, sum lættliga kann ørkymla barnið. Tær nevna eitt dømi: Foreldur komu í barnagarðin um fýratíðina eftir barninum, sum ikki var so fegið at fylgja við beinanvegin. Og so spyrja foreldrini barnið, um tað kemur við heim nú… ella skulu vit koma aftur um eitt korter…? Jamen, var ikki orsøkin til, at foreldrini komu eftir barninum, júst hon, at tey skuldu hava barnið heim við sær…?

### Nær skal sigast og nær skal tigast?

Ein av teimum stóru spurningunum hjá starvsfólki á dagstovnum er fráboðanarskyldan. Starvsfólk hava skyldu at boða eitt nú foreldrum frá, verða tey varug við eitthvørt, tey halda vera øðrvísi enn vanligt. Men so er eisini spurningurin, hvat er vanligt. Tað er eisini nakað, sum eitur tagnarskylda Truplir spurningar, sum starvsfólk mugu taka støðu til í hvørjum einstøkum føri. Tí hava fyrireikararnir gjørt av eisini at taka hesar spurningar við á ráðstevnuni. Tonja Ziskason, sosialráðgevi og Jórun Niclasen, pedagogur, fara at røða um, hvussu starvsfólk eiga at umsita fráboðanarskyldu og tagnarskyldu í dagliga samstarvinum við foreldur og aðrar samstarvsfelagar. Hvussu skal fráboðast, og hvussu skal ein fráboðan orðast.

### Góð undirtøka

Ráðstevnan verður í Norðurlandahúsinum 17. og 18. september, og hóast fyrireikararnir enn ikki hava gjørt so nógv við at lýsa við tiltakinum, hava longu eini hálvtannaðhundrað fólk tekna seg, men pláss er fyri munandi fleiri. Dagstovnarnir hava tveir sokallaðar ráðleggingardagar um árið, sum kunnu brúkast í tílíkum føri. Stovnarnir hava eisini nakað av pengum til skeið og ráðstevnur, og lagaligi kostnaðurin fyri hesa ráðstevnu átti at tala fyri stórari undirtøku, sum fyrireikararnir eisini vóna. Kostnaðurin er 1.200 krónur fyri báðar dagarnar, og tá er alt íroknað. Fólk eiga at tekna seg í seinasta lagi 1. juli. Tilmeldingin, sum fer fram á Býlingshúsinum Undir Brúnni, er bindandi.



# Úr heimi hugans

## Barnið !

*So reint og óspilt í*
*vøgguni liggur*
*tíðin gongur og*
*eygað hyggur*
*ansa tær hvat tú ger,*
*í barnsins eyga tú*
*spegilin er*
*oyra hoyrir, vanda tær*
*um málið skalt*
*mangt eitt barnið situr*
*eina og kalt*
*Kærleika og umsorgan*
*hvørt barn eigur at*
*fáa í hesi verð*
*Barnið er tann*
*dýrabarasti skattur*
*vit eiga her.*

*H.D.*

Nú Nancy hevur sent drunnin til mín, vil eg skriva um onkrar stuttligar hendingar, eg havi haft gjøgnum tíðina í vøggustovuni.

1.sept. 1968 byrjaði eg í vøggustovuni við Strond. Tað var ein sera spennandi dagur, eg var bert 15 ára gomul, jú tað eru nógv ár síðani, men tó minnist eg tað, sum tað var í gjár. Har vóru sera nógv fitt børn, sum vóru forvitin eftir at vita, hvør nú hendan unga gentan var, sum kom har. Eg var sett at arbeiða beinanvegin, fekk stokkar í hond og fekk at vita, at eg kundi binda einar undirbuksir við holfaldi í. Nú vóru góð ráð dýr; eg hevði ongantíð tímað, ei heldur lagt meg eftir tí, at binda, men tað tordi eg ikki at siga, so eg kastaði uppá, so mikið dugdi eg, bant so til, har holfaldurin skuldi vera, og so stóð fast, hvussu í allari víðu verð skuldi eg nú gera. Sleppa nøkrum eygum niður, so var í øllum førum hol í, men nei, eg royndi aftur, bant uppaftur óteljandi ferðir. Tá komið var um døgurðatíð, kom eitt av starvsfólkunum til mín. "Nú, hvussu gongur, góða," spurdi hon, og so mátti eg fram við tí, at eg dugdi ikki at binda holfald; tað helt eg vera stór skomm. Hon vísti mær so, hvat eg skuldi gera, á denn lætti, og so gekk tað við rúkandi ferð, og skjótt kundi eg bæði binda og ansa børnum í senn. Vit bundi troyggjur, húgvur, vøttir, undirbuksur o.a. Børnini blivu skift frá innast til uttast í okkara klæðir, so skjótt tey komu inn um dyrnar, og fóru so í sínu egnu klæðir aftur, tá tey fóru heim. Tað hendi meir enn eina ferð, at okkurt barnið bleiv heintað, meðan tað var í okkara klæðum, so foreldrini kendu tað ikki beinanvegin; tey vóru øll líka ílatin.

Tað var eitt kolosalt álit og ábyrd, ið var lagt á ein. Tey yngstu børnini vóru so evarska lítil, onkur bert góðan mánað, tá tey byrjaðu í vøggustovu. Hvønn hósdag og fríggjadag (tað bleiv deilt yvir tveir dagar) høvdu vit børnini í bað, tað var mangan rokut, onkur vildi ikki í karið, og onnur vildu ikki uppaftur. Vit góvu teimum eisini vitaminir, tey blivu vigað, og tey høvdu eisini hvør sítt kort. Læknin kom á vitjan umleið annan hvønn mánað, minnist meg rætt.

Arbeiðsumstøðurnar vóru ikki av teim bestu. Vit vóru á miðhæddini, so tá ið børnini fóru út at sova, skuldu vit knossast við teimum smáu oman ígjøgnum einar trappur, og so út og eftir brattari brekku oman í kjallaran, har vognarnir stóðu. Vit høvdu eisini nógvar pliktir útyvir at passa børnini. Klæðini skuldu vaskast – tá brúktu tey toyblæður, og alt skuldi leggjast saman og uppá pláss, borð og stólar skuldi skúrast, sengur, vognar og pottar vaskast, og nógv støv var eisini, ið skuldi støvast av, hetta bleiv alt gjørt, meðan tú ansaði børnunum, ongin var ónøgdur, tað var bara so, børnini vóru bæði uppi í arbeiðinum og spældu væl nøgd.

Vøggustovan við Strond lá ímillum Vilhelm Nielsen og Grafia. Í báðum støðum arbeiddu nógvir "sjeikar", so tit kunnu ætla, at teir mangan stóðu við vindeyguni og hugdu at okkum ungu gentum, sum allar vóru í lárkortum kitlum, og mundi rumpan ikki mangan koma undan tá vit spældu við børnini?

So mín sann, nú ein dagin vit fara út í garðin at spæla, hvat síggja vit, ájú, nú





er neglt uppfyri hvørt vindeyga hjá Vilhelm Nielsen. Nú hevði Thorolf fingið nokk. Ha ha. Nakrar dagar seinni var eisini neglt fyri á Grafia. Neyvan høvdu teir tað líka stuttligt eftir hendan dag, eg meini so við, stuttligt er at minnast aftur á.

Mangan var farið túr við børnunum, bæði fyrrapart og seinnapart. Børnini vóru bundin í eitt langt band, 6 á hvørjari síðu. Tey vóru bundin um skøvningin við bendlum, sum vóru heftir fastir í eitt langt band. Ein gekk so fremst og hálaði í bandi, og ein gekk aftast og helt í endanum. Tá vóru tey í hesum troyggjunum og húgvunum, ið vit høvdu bundið, og vit ansaðu væl eftir, at tey vóru líka ílatin, tvs. tvey tey fremstu vóru í bláum, tvey tey næstu í reyðum, og so í brúnum osfr. Ikki var altíð so lætt, tá vit skuldu yvir um vegin, tí datt eitt barn – tað kom ofta fyri – so dekan farið duttu næstan øll hini eisini, og vit vóru jú bara tvey starvsfólk, so tað tók sína tíð, til vit høvdu fingið øll uppaftur á føtur. So tit kunnu ætla, at sjaførarnir mangan vóru ótolnir, og teir sóu sikkurt reytt, tá vit komu í býin.

Tað var ein lærurík, stuttlig og góð tíð, og lønin, jú hon var 350,- kr. um mánaðin, mína fyrstu tíð.

Á Lützenstrøð blivu umstøðurnar betri; nú høvdu vit eini heil hús. Lítlastovan var í kjallarahæddini; tey størru uppiá. Spæliplássið var stórt í mun til tað, vit komu frá, men vit høvdu eisini fingið gestir, sum tey flestu ikki høvdu, MÝS, sum vit vóru ógvuliga bangin fyri, jú tað skal eg siga tykkum, tað var mangan rópan og geylan í kaffistovuni, ið lá beint við síðuna av hjallinum, har mýsnar trivust ógvuliga væl, tær vóru ikki til at dríva burtur. Nú var eg í tí heldigu støðu, at eg ikki ræðist mýs, men síggi eg ein eiturkopp, so skuldi tit sæð ein, ið er bangin.

Einaferð minnist eg, at Sosialbestyrelsen skuldi koma at vitja, tá skuldi alt jú vera so "perfekt". Tað bleiv keypt músagift og vónaðu vit, at tað hjálpti. Tey komu so og blivu víst runt. Tað fyrsta, Nancy sær, tá hon kemur inn í lítlustovu við teimum, er ein stóran pakka av Røde musekorn, ið stendur í eini barnasong, sum onkur av okkum hevði gloymt í skundinum. Hon ger skjótt av, tekur okkurt plagg, sum lá har, og legði tað á posan. Tíbetur varnaðust tey onki, men Nancy var púrasta oyðiløgd av nervum tann dagin, puha, puha, men mýsnar vóru verandi. Vit kundu telja upp í 7 mýs í kaffistovuni í senn.

Børnini trivust væl, høvdu sínar barnasjúkur, tað var so tað, og starvsfólkini vóru so gott sum aldrin sjúk.

Í teimum góðu tíðunum, tá vit høvdu køksdamu, sum eisini tók sær av vaskiklæðunum, høvdu vit nógva góða tíð til børnini; tað burdi altíð verið so.

Tað krevst nógv av okkum, ið starvast við børnum. Vit eru í foreldranna stað fleiri tímar hvønn dag, men tað er eitt sera spennandi arbeiði, og børnini geva so ómetaliga nógvar góðar upplivingar.

Tú kemur ein gráveðursdag til arbeiðis, opnar hurðina, og har eru tey, glað koma tey rennandi einum ímóti; hvat kann vera betur - dagurin er reddaður.

Vit hava gjørt eitt gott arbeiði ígjøgnum tíðina við teimum midlum, vit hava haft. Eg minnist øll "míni børn", um tey ikki minnast meg; tað kunnu tey ikki, tey vóru jú bara 3 ár, tá tey fóru frá okkum, og fleiri av teimum eru nú foreldur her á stovninum. Tað er so stuttligt at síggja tey aftur, so nú er ein blivin omma, kann man siga. Eisini eru nøkur av børnunum starvsfólk her í dag.

Í 1983 komu vit so niðan á Konmansmýru til ein nýggjan stóran stovn, sum vit í fleiri ár høvdu droymt um, og – sum tað besta – fingu vit barnagarð. Hetta er so ein heilt onnur tíð.

*Drunnin, Nancy mær sendi*
*havi nú havt hann í hendi*
*mong góð minnir renna fram,*
*torført at festa á blað*
*so hettar tit hava lisið,*
*ein lítil partur er tað*
*nú gevi eg drunnin til*
*Astu Hjelm frá mær*
*ikki var lætt at fáa drunnin frá sær*
*mong søgdu nei, men hon segði ja*
*hennara minnir vit lesa um*
*í næsta blað.*

Hannebeth Dam .

*Nýggj pedagogútbúgving á bachelorstøði:*

# Føroysk útbúgving

## Roknað verður við, at uppskotið um nýggja pedagog- og læraraútbúgving verður sent áhugaðum til ummælis í summar

Flestu av føroysku útbúgvingunum í Føroyum eru grundaðar á sjálvstøðuga lóg, men so er ikki við pedagogútbúgvingini, sum bert er heimilað í eini orðing í lógini um læraraútbúgvingina. Nú skal sjálvstøðug lóg gerast í sambandi við pedagogútbúgvingina, eins og útbúgvingin sjálv verður endurskoðað, og neyðugar broytingar gjørdar.

At fyrireika hetta arbeiðið og koma við áliti setti landsstýrismaðurin í mentamálum nevnd fyri einum ári síðani. Ikki kann sigast annað enn, at nevndin er væl mannað. Tilsamans 15 fólk, umboðandi Mentamálaráðið, Almannamálaráðið, Føroya Læraraskúla, Fróðskaparsetur Føroya, Føroya Lærarafelag, Føroya Pedagogfelag og Magistarafelag Føroya. Harafturat eru umboð fyri lærara- og pedagoglesandi.

Um orsøkina til at fara undir hetta arbeiðið sigur Mentamálaráðið, at nógvar broytingar eru farnar fram, sum gera, at báðar útbúgvingarnar hava fyri neyðini at verða endurskoðaðar. Djúptøknu samfelagsbroytingarnar seta nýggj krøv til uppaling og undirvísing, samstundis sum nýggjar fatanir eru komnar á sosialpedagogiska økinum. Innan skúla-, dag- og døgnstovnaøkið, á sosiala økinum, innan lærara- og pedagogútbúgvingar og innan gransking og útbúgving sum heild eru hendar so stórar broytingar, at neyðugt er at endurskoða útbúgvingarnar. Mentamálaráðið sigur, at endamálið við arbeiðinum er at endurskoða og dagføra lógargrundarlagið og samstundis tryggja, at grundarlag verður skapt fyri framhaldandi fakligari og pedagogiskari menning av innihaldinum og dygdini í báðum útbúgvingunum.

### Eisini nakað við tign at gera

Petur Zachariassen, lektari, er formaður í nevndini, og Kristianna Sjóvará Jacobsen, fulltrúi í Mentamálaráðnum, er annar av skrivarunum. Tey eru bæði samd um, at sjálvsagt skal eisini pedagogútbúgvingin vera staðfest við lóg, og ikki bert sum nú, í eini heimild í lógini um læraraútbúgvingina. Spjaldrið uttan á Læraraskúlanum ber eisini boð um, at her er talan um ein læraraskúla. At pedagogútbúgvingin eisini heldur til har, sæst ongastaðni. Hetta hevur eisini nakað við tign at gera. Tað er ónøktandi fyri pedagogskúlan, at hann í dag bert er ein partur av øðrum skúla, siga tey bæði. Júst hvussu lógin skal verða, er ikki greitt enn, men ein møguleiki er, at ein og sama lóg verður gjørd fyri skúlan og báðar útbúgvingarnar, har útbúgvingarnar síðani verða ásettar neyvari við hvør sínari kunngerð.

### Á bachelorstøði

Tað er rættiliga ymiskt, hvussu hesar útbúgvingar verða skipaðar í teimum ymisku norðurlondunum. Felags er tó, at lærara- og pedagogútbúgvingarnar í okkara grannalondum eru knýttar at lærdum haskúlum. Í Danmark er tó siðvenja við sokallaðum seminarium, og har hava lærdu háskúlarnir ilt við heilt at góðtaka lærara- og pedagogútbúgvingina á støði við lærdar háskúlar. Hetta sæst m.a. aftur við, at útbúgvingin í Danmark er ein sokallað yrkisbachelorútbúgving, og ikki ein rein bachelorútbúgving eins og í hinum norðurlondunum. Men hvussu er og ikki arbeiðir nevndin við at skipa hesar útbúgvingar soleiðis, at tær verða á bachelorstøði. Soleiðis koma tær á støði við aðrar bachelorútbúgvingar á lærdum háskúlum, og tá ber til hjá

**Kristianna Sjóvará Jacobsen,** fulltrúi í Mentamálaráðnum er skrivari, og **Petur Zachariassen,** lektari, er nevndarformaður






# á altjóða støði

teimum, sum ynskja tað, at fara á lærdan háskúla at nema sær framhaldandi útbúgving.

Tað er eisini mangt annað, sum skal endurskoðast, serliga í sambandi við læraraútbúgvingina, sum m.a. skal lagast til krøvini í nýggju fólkaskúlalógini. Pedagogútbúgvingin er so mikið nýggjari, at har krevjast ikki eins nógvar dagføringar. Læraraútbúgvingin er heldur longri enn pedagogútbúgvingin; og umhugsað verður at gera hesar líka langar. Á pappírinum er talan um ávikavist 4 og 3 1/2 ára útbúgvingar, men í veruleikanum er munurin ikki meira enn einar tríggjar til fýra mánaðir.

### Betri samsvar millum skúla og starvsvenjing

Felags fyri báðar útbúgvingarnar er, at ynski er um at fáa betri samsvar millum skúlan og starvsvenjingina. Petur Zachariassen og Kristianna S. Jacobsen siga seg hava varhugan av, at undirvísingin í skúlanum og arbeiðið í starvsvenjingini er at kalla hvør sín heimur, har tey ikki altíð tala sama mál. Nevndarumboðini fyri pedagogútbúgvingina halda, at sjálv tíðin, sum næmingarnir eru í starvsvenjing, er rímilig, men tørvur er á neyvari málsetningi. Mál og krøv eiga at verða greitt ásett; og tey sakna eina neyva eftirmeting av starvsvenjingarskeiðnum. Harafturat eiga pedagognæmingarnir við ávísum millumbilum at fáa eina meting frá skúlanum, so tey vita, hvussu tey klára seg. Einki skoðsmál verður givið frá skúlanum, fyrr enn lærutíðin er um at vera liðug.

### Føroysk útbúgving á altjóða støði

Tað verður mangan sagt, at útbúgvingar í Føroyum í mongum førum eru meira lagaðar til donsk heldur enn føroysk viðurskifti. Verður nøkur broyting í so máta?

– Vit hava havt ábyrgd av hesum útbúgvingum í so mong ár nú, við tillagingum til okkara viðurskifti so hvørt, so útbúgvingarnar mugu eftirhondini sigast at vera fult út føroyskar útbúgvingar; tí verður ikki tann stóra broytingin í so máta. Men hinvegin hava vit sjálvandi í huga, at samstundis, sum útbúgvingarnar eru lagaðar til føroysk viðurskifti og koma á bachelorstøði, ræður um, at hægra støðið ikki bert er á pappírinum, men eisini dugir í veruleikanum. Til at tryggja dygdina í bachelorstøðinum, er m.a. Fróðskaparsetur Føroya umboðað í nevndini. Endamálið er at skipa føroyskar útbúgvingar á altjóða støði, siga formaðurin og skrivarin.

### Eitt álit í heyst

Eftir upprunaligu ætlanini hjá landsstýrismanninum skuldi nevndararbeiðið verið liðugt í desember í fjør, men av ymiskum orsøkum er drigið nakað út. Ein av orsøkunum er, at nevndin er sera stór, og harafturat hevur arbeiðið verið meira tíðarkrevjandi, enn frammanundan hildið. Nevndarformaðurin sigur, at hann hevur valt at leggja størri dent á dygdina í nevndararbeiðunum, heldur enn at tey skunda sær ov nógv. Hann roknar við at hava álitið liðugt í summar ella í heyst; og tað verður tá sent til ummælis hjá øllum pørtum, sum á ein ella annan hátt varða av hesum útbúgvingum.

## Arbeiðssetningurin umfatar

Meting av, hvussu ein føroysk útbúgving best verður skipað eftir okkara tørvi, samstundis sum hon er á altjóða støði. Herundir eisini viðgerð av spurninginum um møguliga fjarundirvísing.

Lýsing av rákum innan lærara- og pedagogútbúgvingar við støði í kanning av útbúgvingunum í okkara grannalondum.

Kanning / meting av framtíðartørvi á lærarum og pedagogum, herundir eisini av framtíðar førleikakrøvum til teir báðar yrkisbólkarnar

Lýsing av endamálinum við útbúgvingunum og teim ymsu útbúgvingarpørtunum

Lýsing av innihaldi og vavi í útbúgvingunum, herundir vav og samanheingi í námsfrøðiliga og fakliga partinum.

Lýsing av vavi og samanheingi í ástøðiliga og verkliga partinum í útbúgvingini, herundir eisini lýsing av, hvussu samstarvið millum útbúgvingarstað og praktikkskúlar og –stovnar eigur at verða skipað

Lýsing av hvussu útbúgvingarnar kunnu gerast hægri útbúgvingar við granskingartilknýti og –uppgávum.

Lýsing av førleikakrøvum til tey lesandi

Lýsing av førleikakrøvum til undirvísarar á skúlunum við atliti at endurskoðaðu útbúgvingunum.

Lýsing av felagsøkjum fyri tær báðar útbúgvingarnar og hvussu hesi møguliga kunnu samskipast.

Uppskot um, hvussu hesar útbúgvingar og annar hægri lestur kunnu samskipast

Tilevnan av lógaruppskotum og kunngerðum við støði í punktunum 1-11.

Møgulig skiftisskipan fyri lesandi, ið eru byrjað eftir gomlu skipanini.



Ein verkætlan fyri
6-7 ára gomul børn:

# Havnin – ein býur, har børnini trívast

At stimbra skapanargleðina hjá børnum, at byggja brýr millum ymiskar fatanir og fáa positivar ringar at breiða seg. At geva børnunum eina kelslu av, at tey eru ein virðismikil partur av fólkinum, og ein sjónligur partur í býnum. At børnini samantvinna tíðina tey eru í og náttúruna, við sínum skapandi evnum, og soleiðis styrkja sín kjarnusamleika. Soleiðis verður sagt í endamálsorðingini til eina verkætlan, sum Helena Fríðheim, pedagogur, hevur tikið stig til, og sum hon nú samskipar saman við Sigrun Davidsen.



Verkætlanin fevnir um øll tey 320 børnini í seks til sjey ára aldri, sum eru í Tórshavnar Kommunu. Arbeiðsheitið er "Hagin og várið", og sum heitið ber boð um, er ætlanin, at børnini skulu fáa eina stóra felags upplivíng úti í náttúruni, fyri síðani at fáa møguleika til at royna síni skapandi evni á ymiskum verkstøðum í Havn, sum eru Sjónleikarhúsið, Skansastova, Listaskúlin, Hornahúsið og Losjan.

Tiltakið byrjaði 13. apríl og endar 4. juni. Tær báðar fyrstu vikurnar vóru nýttar til skeiðvirksemi og fyrireiking hjá starvsfólki, og restina av tíðini skuldu børnini av álvara í gongd. At geva íblástur og vegleiðing hava fyrireikararnir heitt á Náttúrugripasavnið, Bókasavnið, kvøðarar, dansarar, myndlistafólk, tónleikarar, sangarar og sjónleikarar.

Um sjálvt tiltakið siga fyrireikararnir m.a., at sæð út frá møguleikunum, sum eru í Havnini viðvíkjandi smábarnahugburðinum, er hetta eitt tiltak, sum kann styrkja hugburðin til smábarnamentanina.

At gera eitt sovorðið tiltak kemur at vísa á, hvussu kjarnusamleikin kann styrkjast hjá føroyskum børnum, nú tey vaksa úr smábarnaaldrinum, og fara víðari. Í dag skulu børnini heilt frá byrjan fyrihalda seg til tað multikulturella samfelagið, har virði og normar eru skiftandi.

Í samfelagnum í dag mega børnini, í størri mun enn fyrr, leika á nógvum ymiskum pallum. Saman við heiminum, er barnagarðurin ein stórur partur av veruleikanum hjá barninum. Fyri at skapa og styrkja kjarnusamleikan, skal barnið hava sterk vaksin fólk sum fyrimyndir, siga fyrireikararnir sum vóna, at tiltakið fer at gera hetta sjónligt.

Starvsfólkini hava fingið í boðið íblástrarskeið frá Náttúrugripasavninum, sum eisini hevur givið ráð og vegleiðing. Børnini hava, saman við starvsfólkum/pedagogum, verið í haganum, har tey hava upplivað broytingina, nú alt livnar, og eru síðani komin á verkstaðirnar at endurgeva upplivingarnar,





væl stuðlað av yrkislistafólki. Eftir at børnini høvdu verið á teimum fimm ymisku verkstøðunum, verður arbeitt við at fyrireika eina endaliga framførðslu/sýning.

Tey, sum hava staðið fyri tiltakinum vóna, at børnini hava fingið eina felags uppliving, um at vit í Føroyum hava eitt náttúrutilfeingi og eitt mentanarstøði, sum vit skulu vera góð við og glað fyri, og ikki minst stolt av, og vera vís í, at hetta er nakað, sum útheimurin heldur vera spennandi og gott.

Børnini verða styrkt í tilvitanini um, at tey eru føroyskir heimsborgarar.

– Hetta er ein góður førningur at hava við sær úr barnagarði í skúla, og harafturat kemur tiltakið at hava góða ávirkan á tey yngru børnini, siga fyrireikararnir, sum kundu ynskt sær, at tiltakið verður gjøgnumarbeitt soleiðis, at staðfestast kann, um grundarlag er fyri at fáa eitt smábarnamentunarhús sett á stovn í Havn.

*Hesi hava stuðlað verkætlanini:*
Mentamálaráðið
Mentunardeildin
hjá Tórshavnar Býráð
Kvøldskúlaskipanin
Føroya Sparikassi
Føroya Pedagogfelag
Starvsmannafelagið
Kunningarstovan í Havn
SMS
Kall
Formula.fo
FaroDane



Framhald av síðu 15

Neyðugt er at fáa eitt ráðgevandi toymi, har fólk við serkunnleika kundu gjørt eina heildarmeting av tí einstaka barninum saman við stuðlinum. Toymið skuldi eisini havt sum uppgávu at vegleitt og ráðgivið stuðlunum á teimum ymsu menningarøkjunum. Hetta hevði ført við sær, at arbeiðið bleiv meiri avbjóðandi og spennandi. Magna sigur seg vera sannførda um, at við eini slíkari skipan, høvdu stuðlarnir kunnað gjørt eitt betri og miðvísari arbeiði.

## Partur av stovninum

Ein onnur góð loysn hevði verið, um stuðulin gjørdist ein partur av normeringini á stovninum. Tá hevði stovnurin sett fólkið í starv, og somuleiðis havt ábyrgdina av barninum. Betri grundarlag hevði verið fyri góðum samstarvi inni á stovuni. Starvsfólkið hevði arbeitt sum eitt "team" rundan um barnið, meðan eitt starvsfólk hevði høvuðsábyrgdina av barninum. Ráðgevingin frá toyminum skuldi verið tann sama. Á hendan hátt høvdu vit tryggjað barninum eina nógv betri tænastu. Kontinuitetur og stabilitetur hevði verið í arbeiðinum.

Sum nú er, dettur alt arbeiðið niðurfyri, um stuðulin fer úr arbeiði ella í farloyvi. Vitanin fer saman við stuðlinum, sigur Magna, sum sjálv fór í barnsburðarfarloyvið fyri hálvum øðrum ári síðani og var heima í eitt ár. Hetta tíðarskeið hevði Emil ikki færri enn tríggjar ymiskar stuðlar.

## Bridgehúsið

Áðrenn Magna fór at arbeiða á Lítla Skógi, arbeiddi hon í "Bridgehúsinum", sum er eitt sokallað stuðulstiltak. Kommunan umsat eisini hesi børnini fyri Almannastovuna eitt tíðarskeið. Har gingu børn, sum øll gingu í skúla á Sernámsdeplinum. Seinnapartin komu tey niðan í Bridgehúsið, har stuðlarnir tóku ímóti teimum. Har vóru ikki færri enn 11 børn, sum øll høvdu hvør sín stuðul. Børnini vóru í ymiskum aldri, og høvdu eisini sera ymiskan tørv. Hølisviðurskiftini í Bridgehúsinum vóru ikki nøktandi. Av tí at húsið bert var leigað, fingu vit ikki innrættað okkum eftir tørvi. Í húsinum vóru bert tvey stór rúm, og tað var tí sera torført at fáa arbeiðsfrið. Hetta gekk eisini út yvir tað pedagogiska arbeiðið. Men í Bridgehúsinum myndaðist hetta tíðarskeið eitt fakligt umhvørvi, har stuðlarnir kundu geva hvørjum øðrum nakað av fakligum førleikum og royndum.

Kommunan gjørdi tað hon kundi fyri at bøta um arbeiðsumstøðurnar í Bridgehúsinum. Hóast hetta vóru nakrir grundleggjandi trupulleikar. Eingin leiðsla var á staðnum, fíggjarkarmarnir vóru ógreiðir, trupult var at fáa fólk at støðast o.s.fr. Saman við Sosialu Deild á Býráðnum sendu vit Almannastovuni skriv, har vit greiddu frá hvørjar broytingar vit kundu hugsað okkum. M.a. vístu vit á, at vit vóru óneyðuga nógvir stuðlar í mun til tey 11 børnini. Her vóru pengar at spara, sum kundu verið brúktir til eina leiðslu, serráðgeving/serviðgerð og til fakliga menning. Høvuðsboðskapur okkara í skrivinum var, at neyðugt var at skipa virksemið sum ein stovn, fyri at hesi børn kundu fáa virðiligar sømdir. Men einki tóktist bera til m.a. orsakað av tørvandi lógargrundarlag. Í dag hevur Almannastovan dagliga raksturin og evsta myndugleika í Bridgehúsinum, og eftir sum skilst eru umstøðurnar als ikki batnaðar. Av teimum 10 stuðlunum, sum arbeiða í Bridgehúsinum, er bert tann eini pedagogur, so tað í sær sjálvum sigur eitt sindur um hvussu umstøðurnar eru.

## Uppléring krevst

Magna sigur, at tað er spell, at stuðlar sum heild støðast illa í starvi í mun til aðrar samfelagsbólkar, og at so fá fólk við námsfrøðiligari útbúgving arbeiða sum stuðlar. Í løtuni arbeiða 15 stuðlar á Serdeildini í Tórshavnar Kommunu, men bara tríggir teirra eru faklærdir. Hetta hóast starvið innihaldsliga er ógvuliga spennandi og gevandi. Tú arbeiðir bert við tí eina barninum, og hevur tí møguleika at fordjúpa teg í tínum arbeiði. Eg ivist ikki í, at allir stuðlar, royndir sum óroyndir, gera sítt besta, men tað er ikki altíð nóg mikið. Nógv størri dentur eigur at verða lagdur á at menna starvsfólk, og geva teimum tað uppléring sum krevst.

-Øll menniskju kunnu mennast. Tað er okkara ábyrgd, at hesir einstaklingar gerast so sjálvstøðugir sum gjørligt, so teir kunnu taka lut í samfelagnum á so nógvum økjum, sum til ber. Hesum máli er léttari at náa, um tað miðvísa arbeiðið við børnunum fer í gongd so tíðliga sum til ber. Tað er mín vón at umstøðurnar hjá hesum børnum verða broyttar munandi í framtíðini, sigur Magna.


Heyst og vetur 2004

**Supervisión**
Synergi og Den Sociale Højskole í Keypmannahavn skipa fyri grundútbúgving í Supervisión. Talan verður um 3 modulir + venjing millum modulini. Fyrsta modul 1 verður í november.

**Atle Dyregrov**
Kombinera ein-dagsskeið:
**1.** Tilbúgvingarætlanir á skúlum og stovnum
**2.** Brúk av bólkum, tá tú skalt hjálpa børnum aftaná kreppu- og traumatiskar upplivingar. Á www.google.com finnur tú um 1.920 hits uppá Atle Dyregrov.

**Etingarólag**
Kendi norski psykiatarin og psykoterapeuturin Finn Skårderud, sum m.a. hevur skrivað bøkurnar „Sultekunstnerne - kultur, krop og kontrol" (1992) og Stærk/svag (2002), kemur at hava skeið fyri fakfólki og almennan fyrilestur um etingarólag. Finn Skårderud er altjóða serfrøðingur í etingarólag.
Á www.google.com finnur tú um 6500 hits uppá Finn Skårderud.

**Tilboð til stovnar og feløg**
Synergi kann gerast tykkara skeiðs- og ráðstevnudepil! Synergi átekur sær at skipa fyri skeiðum, workshops, ráðstevnum og tiltøkum fyri stovnar og feløg - tvs. tit rinda bert tá/um tit senda fólk til tiltøk okkara. Ringið og fái eitt óbindandi prát um, hvussu hetta kann skipast.
Meira um tiltøk okkara inni á heimasíðuni www.synergi.fo

Synergi
Tvørgøta 1 – 100 Tórshavn – Tel. 22RING – 22KIMA – Fax. 322 355
www.synergi.fo – synergi@synergi.fo

Dimmalætting 341200




BARN
UNGDOM
MISSBRUK

## Nordiskt seminarium för socialpedagoger och socionomer

**Den 27–29 augusti 2004 i Skövde**

**Tema:** Barn, ungdom och missbruk utifrån ett nordiskt perspektiv och utifrån olika sociala yrkesroller.

Konferensen arrangeras av Nordiskt forum för socialpedagoger och Nordiska socionomförbundens samarbetskommittée i samarbete med YSS (Yrkesförbundet Sveriges socialarbetare). Konferensen samordnas med YSS´s stora kongress i psykosocialt förändrings-arbete.

Mer information ger freddy@gustavson.as, tfn 0705-10 29 12, thomas.goldberg@akademikerforbundetssr.se, tfn 08-617 44 62, yvonne.ahlstrom@sktf.se, tfn 08-789 64 01.

NSSK NORDISKE SOCIONOMFORBUNDS SAMARBEJDSKOMITE Coordinating Committee for Nordic Associations of Social Workers

**NFFS**, Nordiskt Forum For Socialpaedagoger


- Heildarveitari innan reinføri
- Dygdar ráðgeving og vegleiðing
- Vit flýggja vøruna út ókeypis og til tíðina
- Vit seta vøruna uppá pláss
Blika
- reinir serfrøðingar
Dustsúgvarar frá
Nilfisk Advance
setting standards
Sápa til øll endamál frá
NOVADAN
Pappír til øll endamál frá
KATRIN
Tel 35 66 66 · www.blika.fo
Fax 35 66 67 · Akranesgøta 9 · Postboks 316 · FO-110 Tórshavn
Kom og vitja okkara snotiligu høli og fá eitt prát
SANSIR 355 355

BABY & BARNAÚTGERÐ
...eitt sindur betri
Niels Finsensgøta 18 · 100 Tórshavn
31 51 01 · T-póstur: chess@post.olivant.fo


Udendørs leg til foråret
Ny energi - så prøv KOMPAN ELEMENTS™
KOMPAN
Løbehjul - til de kvikke
Scooter - til de mindste
IMPORT


Vit hava skorið tað út í papp
TRYGG EFTiRLØN
Føroya Lívstrygging · P.O. Box 206
FO-110 Tórshavn · Faroe Islands
Tel +298 311111 · Fax +298 318919